# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 17. desember 2009




Eina løtu var Kyndil í trupulleikum móti KÍF, men teir fingu skjótt tamarhald á, og eftir steðgin var spenningurin ikki longur tann heilt stóri

# Favorittarnir í hálvfinalurnar

**Eingin skelkur kom í teimum fýra fjórðingsfinalunum í manshondbólti, sum vórðu spældar í gjár. Neistin, VÍF, Kyndil og H71 verða liðini í hálvfinaluni**




jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk


Tann spenningur, sum var undan dystunum, var fyri tað mesta í Havn, har fýra lið úr Atlantic Airways-deildini kappaðust um tvey pláss í hálvfinaluni.

Fyrri dysturin stóð her millum Neistan og StÍF, sum eru nummar eitt og tvey á stigatalvuni, men eins og leygardagin, so tóktist munurin á vøllinum at vera nógv størri enn sum so. Neistin fór avstað stutt undan steðginum, og í seinna hálvleiki var ongan tíð nakar ivi um, hvat lið skuldi víðari.

Í dystinum millum Kyndil og KÍF var munurin ikki heilt so stórur, men í veruleikanum hevði Kyndil her tamarhald á tí mesta. KÍF spruttaði eina løtu tíðliga í dystinum, men eftir at Kyndil hevði brúkt sítt fyrra time-out, fingu teir takið á dystinum.

Eftir steðgin var munurin støðugt eini fýra mál, og okkurt skifti heili sjey av slagnum. So tað var ongan tíð soleiðis, at heimasigurin var í vanda.

## Stórsigrar í Vestmanna

Í Vestmanna vóru eisini tveir dystir á skránni. Í báðum førum millum lið úr bestu og næstbestu deildini, og munurin á máltalvuni samsvaraði eisini við hetta.

Hóast Team Klaksvík so smátt kann venja seg vi tankan um, at teir skulu spæla í fremstu røð næsta kappingarár, so fingu teir samstundis staðfest, at tað er munur á. VÍF hevði fult tamarhald allan dystin, eftir at teir longu fyrstu løtuna skræddu seg fullkomuliga leysar.

Og H71 hevði heldur ongar trupulleikar, tá teir á útivølli hølvaðu næst besta liðið hjá VÍF av. Her varð munurin heili 25 mál, so spenning av nøkrum slag var talan ongan tíð um.

## FAKTA

**Úrslitini mikukvøldið**

| | |
|---|---|
| Neistin-StÍF | 32-20 (15-11) |
| VÍF-Team Klaksvík | 35-26 (21-12) |
| Kyndil-KÍF | 29-25 (14-12) |
| VÍF 1-H71 | 15-40 (-7-19) |

**Hálvfinalurnar**

**19. desember**
VÍF-Kyndil
Neistin-H71

**26. desember**
Kyndil-VÍF
H71-Neistin

# Fleyr trýstir Mjølnir

**Uttan stórvegis hóvasták vann Fleyr í gjárkvøldið 3-0 á KÍF, og sostatt er Fleyr væl við í oddanum í bestu kvinnudeildini**

**KÍF-Fleyr 0-3**
**(8-25, 7-25, 13-25)**

Við útisigrinum á KÍF í gjárkvøldið leggur Fleyr trýst á Mjølnir. Liðini hava nú bæði 12 stig, men Mjølnir, sum er næstfremst í Eik-liguni hjá kvinnum, hevur spælt ein dyst færri. Í kvøld klokkan 18 skal Mjølnir á Giljanesi ímóti Drátti, og har er so møguleikin hjá klaksvíkskvinnum aftur at fara tvey stig frá Fleyr.

Fleyr kom til Kollafjarðar við bara sjey spælarum og einum libero, umframt einum spælara á bonkinum. Men kortini stóð ikki á at vinna væntaða sigurin, og í løtum varð tað enntá gjørt við góðum spæli. Við góðum móttøkum og servum legði Fleyr so mikið av trýsti á KÍF, at sigurin longu frá fyrstu løtu var ávegis.

Unga KÍF-liðið fekk einki gjørt við mótstøðuna í fyrsta og øðrum setti, og tá tað í seinnu helvt av triðja setti eydnaðist heimaliðnum at betra móttøkurnar og fáa longri duellir, gjørdist tað bara pynt – og tá tók sigursvísa Fleyr-liðið sær eisini meira av løttum.

**hil**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | | | | | vunnin | tapt | sett- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v | - | t | sett | sett | munur | stig |
| 1 | SÍ | 9 | 9 | - | 0 | 27 | 3 | 24 | 18 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 6 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 3 | Fleyr | 10 | 6 | - | 4 | 20 | 16 | 4 | 12 |
| 4 | TB | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 10 | 8 | 10 |
| 5 | Dráttur | 9 | 4 | - | 5 | 17 | 16 | 1 | 8 |
| 6 | ÍF | 9 | 1 | - | 8 | 3 | 24 | -21 | 2 |
| 7 | KÍF | 9 | 0 | - | 9 | 1 | 27 | -26 | 0 |